Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

# 21 Grams

Tríggjar mannalagnur bresta saman undir sera spentum og syrgiligum umstøðum. Vit hitta Christinu (Noami Watts), ein fyrrverandi rúsevnismisnýtari og móðir at tveimum smágentum. Lítla familja hennara verður rakt av eini ræðuligari vanlukku. Maður hennara og báðar smágenturnar doyggja í eini ferðsluvanlukku, tá tey verða yvirkoyrd. Eisini hitta vit tann deyðasjúka Paul Rivers (Sean Penn). Honum hevur neyðini at fáa eitt frískt hjarta transplanterað innanfyri stutta tíð. Vónin er lítil fyri at hetta kann henda, og unnusta hansara ynskir so inniliga at føða eitt barn saman við honum, áðrenn hann doyr. Men brádliga so vil lagnan Rivers tað annarleiðis. Jack Jordan (Benicio Del Toro) er nýliga umvendur og hevur funnið svarið í kristnu trúnni, hann hevur sitið fongsulsdóm sín og er ein angrandi gudsmaður. Ein dagin er hann óansin aftanfyri bilróðrið og koyrir við nógvari ferð á tvær smágentur og pápa teirra. Nú verður trúgv hansara sett á eina roynd. Tríggjar lagnur, ið óloysiliga eru bundnar saman í einari søgu um vón og menniskjaskap, treystleika og um at yvirliva.



*Tað sigst, at júst í tí løtuni, at deyðin ger um seg, lætnar kroppurin 21 gramm. Drama við m.a. Benicio Del Toro og Naomi Watts*



*Paul Rivers (Sean Penn), raktur av eini deyðiligari sjúku, stríðist við bæði lív og deyða*

# Coldplay Live



*Coldplay á palli í Sydney*

Tað hevur gingið sera væl og skjótt hjá tónleikabólkinum Coldplay - Kanal 5 sendir mánakvøldið ein konsertfilm frá 2003. Við fýra grammy-virðislønum, fýra Brit-awards og næstan 17 milliónum seldum fløgum er tað trupult at ímynda sær, at Coldplay einaferð ikki hevði tað stóra uppá seg. Árið 2003 gjørdist gott fyri limirnar í bólkinum við Chris Martin á odda. Við útgávuni A Rush To The Head prógvaði bólkurin, at teir uttan iva vóru millum tær virðismiklastu bretsku útflutningsvørurnar tað árið - fløgan vann ikki minni enn tvær Grammy-virðislønir og tríggjar MTV Video Music Awards. Í konsertfilminum, Coldplay Live, kemur hyggjarin á ferð við Coldplay til Hordem Pavilion í Sydney, Avstralia. Á konsertini í Sydney hetta kvøldið framførdi bólkurin løg sum Yellow, Trouble, Clocks, My Place og so The Scientist. Í løtuni gleða fleiri Coldplay-fjepparar seg til ta nýggju komandi útgávuna X&Y hjá bólkinum, ið kemur út í juni.



*Fleiri bíða í spenningi eftir komandi útgávuni hjá Coldplay, ið hevur fingið heitið X&Y*